


*Tær gulu úr Runavík máttu aftur av vøllinum, uttan at hava fingið fult, og harvið feyk møguleikin um finalupláss*

# Finaluplássið fokið

**HONDBÓLTUR** Tjaldur hevði vind í seglunum, tá Trygvi Mortensen loysti Bogdan Burcea av. Tað rakk til gull í steypakappingini, men finaluplássið í landskappingini er fokið

Uni Holm Johannesen

Tríggir dystir uttan at fáa fult. Tað ber snøgt sagt ikki til í endaspurtinum, tá trý lið kappast um at sleppa í finalurnar um føroyameistaraheitið. Tað hevur Tjaldur fingið at sanna. Kvinnurnar úr Runavík vunnu heldur ikki í gjár. Úrslitið hevur við sær, at Neistin og Stjørnan hava staðfest sítt finalupláss undan seinasta umfarinum.

### Gekk væl

Tað loysti seg at skifta venjaran í november. Bogdan Burcea hevði ikki nøktandi úrslit at vísa á í hesum kappingarárinum, tá Trygvi Mortensen loysti hann av sum venjari hjá Tjaldur í november. Tjaldur átti tá ikki virknan leiklut í finalustríðnum. Kvinnurnar úr Runavík vunnu níggju landskappingardystir upp í slag, umframt at tær vunnu steypakappingina. So kom stígur í. 30. januar tapti Tjaldur fyri Stjørnuni í Klaksvík. Síðani hava stór sveiggj verið í úrslitunum. Tær raktu botnin fyri tveimum vikum síðani, tá Neistin vann við 21 málum á Tjaldri í høllini á Hálsi.

Orsøkirnar eru fleiri. Ábyrgdin hjá Simonu Petersen og Adinu Petrea hevur verið stór. Liðini hava dugað at vart fyri teimum og somuleiðis tikið broddin úr álopsspælinum. Avgerandi dystirnir, sum millum annað móti Neistanum, var Annika Thomsen skadd og Adina Petrea var darvað av sjúku. Hon spældi tó allíkavæl, men ikki við fullari megi.

### Taptu við einum

Treytirnar hjá Tjaldur vóru einfaldar undan dystinum. Liðið skuldi vinna sínar írestandi dystir, og Neistin skuldi snáva í heimadystinum móti Stjørnuni næsta vikuskiftið. Tað eydnaðist ikki. VB hevur argað hini liðini á heimavølli, og tað gjørdu vágskvinnur aftur hesaferð. VB vann við einum máli, 30-29, á Tjaldur og syrgdi samstundis fyri, at Stjørnan og Neistin spæla finalurnar um føroyameistaraheitið.

*uni@sosialurin.fo*

# Sannførandi sigur

**HONDBÓLTUR** Stjørnan vann greitt og uppiborið á StÍF. Klaksvíkskvinnur staðfestu samstundis, at tær eru fremst á stigatalvuni í hesum kappingarárinum

Uni Holm Johannesen

Í teimum 24 landskappingarumførunum hevur Stjørnan verið best. Neistin kann ikki fáa klaksvíkskvinnur aftur á stigatalvuni undan dystinum næsta vikuskiftið. Tað gevur Stjørnuni tann fyrimunin, at verður talan um ein triðja finaludyst í stríðnum at vinna meistaraheitið, spæla klaksvíkskvinnur tann dystin á heimavølli.

### Javnur fyrri hálvleikur

StÍF hevur verið botnproppur alt kappingarárið. Tað verður sjáldan vænta nakað av teimum, og tað var eisini óvæntað, at strandakvinnur fóru til hálvleiks við einum javnleiki í KÍ-høllini í gjár.

Stjørnan var við yvirlutan, men síðstu løtuna fyri steðgin gjørdu gestirnir bart og vunnu seg upp á javnt. Tann støðan helt sær ikki leingi. Heimaliðið legði nógv fyri beinanveg í seinna hálvleiki. Umfarið var fáar minuttir gamalt, tá Stjørnan var á odda við fýra málum, og tá kláraði StÍF ikki at hótta aftur.

Venjarin hjá Stjørnuni brúkti eisini høvið at royna fleiri av yngru spælarunum, og tað riggaði væl.

Av tí, at Stjørnan vann hesaferð, og Tjaldur snávaði í Vági, stendur einki upp á spæl, tá klaksvíkskvinnur vitja Neistan næsta vikuskiftið. Tað verður ein fyrireikingardystur áðrenn finalurnar.

*uni@sosialurin.fo*

## **VB – Tjaldur** 30-29 (18-17)

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**10 min.: 4-5**
**20 min.: 8-14**
**40 min.: 21-20**
**50 min.: 26-24**

**VB:** Gurið Mortensen 6, Gintare Lydekaite 6, Bára K. Mortensen 5, Rannvá Johannessen 5, Justina Balzarviciute 4, Laila Jespersen 3, Svava Vestergaard 1.
**Tjaldur:** Adina Petrea 11, Simona Petersen 6, Annika Thomsen 4, Heidi Sevdal 3, Sarah Ann Thomsen 3, Benadikta Johannesen 2.
Útvísingar: VB 3, Tjaldur 3.

## **VÍF – Kyndil** 20-23 (9-9)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 3-2**
**20 min.: 6-5**
**40 min.: 10-13**
**50 min.: 14-17**

**VÍF:** Liljan Djurhuus 9, Torgunn Johansen 3, Halla Midjord 3, Heidi Joensen 2, Elisa Leo 1, Annika Poulsen 1, Linda Davidsen 1.
**Kyndil:** Jórun Ludvig 5, Ásleyg Súnadóttir 4, Heidi Maria Akselsen 3, Súsanna Petersen 3, Randi S. Wardum 3, Birita Mortansdóttir 2, Anja Heinadóttir 1.
Útvísingar: VÍF 4, Kyndil 2.

## **Stjørnan – StÍF** 34-25 (14-14)

Dómarar: Magnus í Króki og Thomas J. Thomsen

**10 min.: 7-3**
**20 min.: 12-8**
**40 min.: 22-17**
**50 min.: 29-21**

**Stjørnan:** Valentina Suciu 8, Durirt Mikkelsen 7, Alina Anghel 7, Edith Hansen 5, Una Olsen 3, Judit Hansen 2, Ella Petersen 1, Sylvia Hansen 1.
**StÍF:** Fríðrun Danielsen 8, Rebekka Justinussen 8, Birna Tummasardóttir 4, Bára Berthelsen 3, Birita Poulsen 1, Lilja Gregersen 1.
Útvísingar: Stjørnan 0, StÍF 2.

## **Sunset Deildin** *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 23 | 653 | 542 | 111 | 39 |
| 2 | Neistin | 23 | 657 | 514 | 143 | 36 |
| 3 | Tjaldur | 23 | 645 | 562 | 83 | 33 |
| 4 | VB | 23 | 598 | 579 | 19 | 26 |
| 5 | Kyndil | 24 | 553 | 606 | -53 | 16 |
| 6 | VÍF | 23 | 517 | 636 | -119 | 7 |
| 7 | StÍF | 23 | 463 | 647 | -184 | 5 |

# Umsíðir bragdaði

**FÓTBÓLTUR** Tað hevur verið lítið um Kyndil seinastu vikurnar, men umsíðir eydnaðist at skava nøkur stig saman

Uni Holm Johannesen

Kyndil hevði ikki vunnið í seinastu 10 landskappingardystunum undan vitjanini í Vestmanna í gjár. Seinasta, Kyndil fekk fult, var tann 15. januar, tá botnliðið StÍF vitjaði í høllini á Hálsi.

Nú bragdaði aftur. Kyndilskvinnur vunnu við trimum málum í ítróttarhøllini í Vestmanna í gjár. Úrslitið var 23-20.

### Einki at spæla fyri

Dysturin var javnur allatíðina. Tað var ikki fyrr enn seinastu minuttirnar, at Kyndil fór framum og fekk eina leiðslu, sum heimaliðið ikki kláraði at hótta.

Tað hevur darvað spælinum hjá bæði VÍF og Kyndil seinastu vikurnar, at liðini hava einki havt at spælt fyri. Einasta avbjóðingin hevur verið at arga tey trý ovastu liðini, sum hava stríðst um finaluplássini. Tað hevur havt sína ávirkan á avrikini, og dagurin í gjár var einki undantak. Liðini fingu ongantíð veruliga ferð á spælið, og fleiri óneyðug mistøk vóru.